## Touré til Barcelona

Sama dag, sum Thierry Henry kláraði læknaroyndina í Barcelona, hevur spanska stórfelagið keypt enn ein spælara. Talan er ikki um verjuleikaran, Kolo Touré, hjá Arsenal, men um yngra bróður hansara Yaya Touré, sum Barcelona hevur keypt frá franska Monaco. Yaya Touré verður mettur at vera ein av bestu ungu miðvallarunum í evropeiskum fótbólti, og fleiri stórfelag royndu at fáa fatur á evnaríka leikaranum frá Fílabeinsstrondini. Barcelona hevur goldið 90 mió. kr. fyri Touré.



## 100 mió fyri Owen-skaða

Enski landsliðsleikarin, Michael Owen, hevur ikki spælt nógvar dystir fyri felag sítt Newcastle, síðani hann kom til felagið frá Real Madrid á sumri 2005. Størsta grundin er skaðin, sum Michael Owen fekk í HM-dysti fyri Ongland ímóti Svøríki síðsta summar. Nú er tó greitt, at Newcastle fær endurgjald fyri skaðan hjá Owen, sum hevur hildið honum úti í 10 mánaðir. Hetta veit enska heimasíðan, www.teamtalk.com, at siga. Eftir øllum at døma er Newcastle komið ásamt við FIFA og FA, og hetta ger, at Newcastle fer at fáa góðar 100 mió. kr. í endurgjaldi fyri skaðan hjá álopsleikaranum.

## Eysturoyingur enn einaferð

**Eysturoyingur vann fyri triðju ferð á rað trygt kappingina hjá 10-mannaførum, men munurin niður til Vestmenning gerst minni og minni**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kappingin hjá 10-mannaførunum hevur ikki verið serliga spennandi í ár, tí Eysturoyingur hevur verið nógv sterkari enn hinir bátarnir. Harafturat hava bert verið tveir og tríggir bátar við til ávikavist Norðoyastevnuna og Sundalagsstevnuna, og tí hevur heldur ikki verið spenningur um næstu plássini.

Jóansøkan bleiv heldur einki undantak í mun til hinar róðrarnar. Tað var aftur Eysturoyingur, sum setti dagsskránna, og longu frá byrjan av løgdu teir seg fram um bæði Vestmenningin og Havnarbátin. Tað gekk ikki long tíð, áðrenn Havnarbáturin rættiliga dragnaði, men Vestmenningur royndi leingi at fylgja við Eysturoyingi.

At enda mátti báturin úr Vestmanna sleppa, og síðstu 1000 metrarnar økti Eysturoyingur støðugt um munin.

Tá teir komu á mál, vóru teir tvær bátslongdir framman fyri Vestmenningin, sum tó hevur tikið seg nógv fram síðstu tveir róðrarnar. Spurningurin er so, um teir fara at hótta Eysturoyingin ein av komandi róðrunum.

# So bragdaði hjá Ørnini



*Ørnin vann tryggan sigur í kappingini hjá 5-mannaførum við kvinnum á Jóansøku. Hetta er sostatt triði vinnarin í trimum róðrum, og kappingin um FM-stríðið er púra opin millum fýra bátar.*

*Mynd: Ólavur Fredriksen*

**Sílið, Frúgvin og Fípan Fagra hava kappast um fremstu plássini fyrstu tveir róðrarnar hjá 5-mannaførum við kvinnum, men leygardagin blandaði Ørnin seg rættiliga upp í FM-stríðið, tá tær settu allar hinar bátarnar til viks í róðrinum á Jóansøku**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kappingin hjá 5-mannaførum við kvinnum hevur verið sera spennandi í ár, og tað tykist, sum fleiri bátar kunnu blanda seg í kappingina um FM-stríðið. Í fyrsta róðrinum á Norðoyastevnu var tað Sílið úr Havnar Róðrarfelag, sum vann róðurin í harðari kapping við serliga Teistan.

Á Sundalagsstevnu lá ikki so væl fyri hjá Sílinum, sum endaði á triðja plássi, og í staðin var tað Frúgvin, sum megnaði at vinna róðurin framman fyri Fípuna Føgru. Kappingin hjá 5-mannaførum við kvinnum var tó ógvuliga hørð á Sundalagsstevnu, og bert hálvonnur bátslongd var á muni frá Frúnni aftur til Teistan, sum endaði á sætta plássi.

Leygardagin var so triði FM-róðurin á skránni á Jóansøkuni á Tvøroyri, og kappingin tóktist vera púra opin millum fleiri bátar. Úrslitið var eisini yvirraskandi, tí enn ein nýggjur vinnari bleiv funnin hjá 5-mannaførum við kvinnum.

### Ørnin førdi allan vegin

Tað var Ørnin úr Sandavági, sum fekk bestu byrjanina í róðrinum hjá 5-mannaførum við kvinnum á Jóansøkuni. Ørnin fór nakað fram við hinum bátunum í startspurtinum, men Sílið var tó eisini rættiliga væl við í kappingini frá byrjan av. Tað sama vóru bæði Frúgvin, Fípan Fagra, Ritan og Teistin.

Men sum leið inn eftir fjørðinum gjørdist tað meir og meir greitt, at kappingin fór at vera millum Ørnina og Sílið. Hesir báðir bátarnir øktu so líðandi um munin niður til hinar bátarnar, og tað var alla tíðina Ørnin, sum hevði munin.

Tá bátarnir fóru undir endaspurtin royndi Sílið at trýsta Ørnina, men manningin úr Sandavági lat ikki við seg koma. Síðstu 100 metrarnar øktu tær um munin niður til Sílið, og tá bátarnir komu á mál, var Ørnin næstan leyst av Sílinum, sum eisini var leyst av næstu bátunum.

Kappingin um triðja plássið var eisini hørð, og her megnaði Frúgvin akkurát at fáa stavnin fram um Fípuna Føgru.

### Ørnin við aftur

Sigurin á Jóansøku er uttan iva komin væl við hjá Ørnini. Síðsta kappingarár vunnu kvinnurnar umborð á Ørnini heili seks av sjey róðrum, og tí hava tær helst ikki verið heilt nøgdar við fyrstu tveir róðrarnar í ár, har tær endaðu á ávikavist 5. og 6. plássi.

Einasta róðurin, sum Ørnin ikki vann í fjør, var á Jóansøkuni, og tí er tað rættiliga stuttligt, at einasti róður, sum tær hava vunnið higartil í ár, er komin á nevniliga Jóansøkuni.

Í stríðnum um FM-heitið er Sílið, sum endaði á øðrum plássi á Jóansøku, enn á odda. Tær hava 16 stig, meðan Frúgvin hevur 14 stig í hølunum á teimum. Við sigrinum á Jóansøku er Ørnin tó rættiliga við at blanda seg í FM-stríðið. Tær liggja nú javnar við Fípuna Føgru á triðja plássi við 12 stigum.

Róðrarnir hjá 5-mannaførum við kvinnum hava verið sera spennandi í ár, og tí verður bíða við spenningi til komandi róðurin, sum verður á Varmakeldu í Fuglafirði komandi leygardag.